# Eyðmerking av laksa- og seiðalús

Fiskaaling
Aquaculture Research Station of the Faroes

Tá ið laksalús og seiðalús skulu eyðmerkjast, eru trý høvuðseyðkenni, ið kunnu nýtast.

1. **Stødd** - Tá ið laksalúsin er um at verða vaksin, er hon munandi størri enn vaksin seiðalús (mynd 1).
2. **Skap** - Laksalúsin er meira rundleidd. Seiðalúsin er meira langleidd (mynd 2).
3. **Gongulag** - Tað eru serstakliga tær smærru flytføru laksalýsnar og seiðalýsnar, ið kunnu vera truplar at skilja at (mynd 2, A og B). Um skumpað verður varisliga undir tær, fara seiðalýsnar aloftast rennandi avstað. Tær flytføru laksalýsnar hava ikki hug at flyta seg.




**Mynd 1**
A. Kynsbúgvin laksalús
B. Kynsbúgvin seiðalús




**Mynd 2**
A. Seiðalús
B og C. Flytfør laksalús
D. Kynsbúgvin laksalús uttan eggjastreingir

**Fastar lýs** kunnu eyðmerkjast við at skumpa varisliga undir tær. Um lúsin er føst, sveiggjar hon álíkt eini klokku.







**Flytfør laksalús ymisk á liti**

Trupult kann vera at nýta litin til eyðmerking av lús. Liturin kann vera ymiskur á sama slagi, og líknandi millum sløg (mynd 2, A og B).



Tvær lýs, ið nørast, kunnu líkjast eini kynsbúnari lús uttan eggjastreingir (mynd 2, D).

Støð á fiskinum, har **fastar lýs** oftast eru at finna.



Støð á fiskinum, har **flytførar laksalýs** oftast eru at finna.



Støð á fiskinum, har **kynsbúnar laksalýs** oftast eru at finna.

